# Væleydnað messingvikuskift



*Stór konsert endaði tónleikastevnuna í Vági um vikuskiftið*

**Tónleikastevnan í Vági eydnaðist væl og sunnudagin var konsert, ið prógvaði, at væl varð fingið burturúr vikuskiftinum**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Ulf Nordlund, tónleikalærari, stóð um vikuskiftið á odda fyri tónleikastevnu í Vági, har ungir hornblástursnæmingar og meira vandir tónleikarar tóku lut. Umframt næmingar úr 4., 5., og 6., flokki í Vágs Skúla, so tóku eisini lærarar í Sekstettini Suðurættin lut og eisini Tvøroyrar Hornorkestur.

Næmingar úr 8. flokkunum hava júst fingið rútmu ljóðføri og hava leikt í nakrar fáar dagar, men longu merkjast ljóðbylgjurnar og trummuljóðini duna.

Heilt fitt av fólki var til konsertina í Vágs Skúla sunnudagin seinnapart - sjálvandi mong forvitin og spent foreldur og ommur og abbar.

Og eingin fór vónbrotin heimaftur.

Tað ljóðaði væl frá fyrstu stund. Og stuttligt var, at lagt varð fyri við rútmustykki, ið minti ikki sørt um Safri Duo. Øll í stóra orkestrinum, frá teimum minstu til tey stórstu, klappaðu og tóku taktir í felag, so tað stóð eftir í. Og væl var vant, tí samspælið var frálíkt.

Eisini ymsu hornstykkini gingu væl og stuttliga stykkið, sum nevnist Blues í C ella Jam í C, ella okkurt tílíkt, riggaði væl, tí allir luttakararnir tá sleppa at royna seg sum solistar.

Nýggi rútmubólkurinvið 8. floks næmingum riggaði væl og tað swingaði væl undir leiðslu av Jónas Jeppesen, trummuleikara.

Køna leiðslan hjá Ulf Nordlund vísti seg at bera frukt, tí konsertin sunnudagin var virðiligur endi, eftir harða venjing í tveir dagar, har tað hugnaliga og felagsandin tó eisini átti innivist.

# Útgoldin avlopsskattur ávirkar forsorgarveitingar

**At avlopsskattur frá 2003 ávirkar forsorgarveitingar er komið óvart á nógv fólk. Dømi um avlopsskatt er barnafrádráttur, sum ikki er brúktur**

**SKATTUR**
*Tíðindaskriv*

Fram til 1997 varð avlopsskattur drigin frá forsorgarveitingunum. Í 1997 avgjørdi táverandi landsstýrismaður at broyta hetta. Avlopsskattur, sum stavaði frá óbrúktum barnafrádrátti, skuldi ikki longur mótroknast. Kærunevndin í almannamálum hevur síðani staðfest, at avlopsskattur frá óbrúktum barnafrádrátti, eins og allar aðrar inntøkur skal dragast frá forsorgarveitingini.

Sum Almannastovan kunnaði um í fjølmiðlunum í fjør, tók landsstýrismaðurin niðurstøðuna hjá kærunevndini til eftirtektar og broytti avgerðina, sum varð tikin í 1997. Tískil skal avlopsskattur frá og við 2003 dragast frá ásettu forsorgarveitingini. Hetta skal gerast uttan mun til, um avlopið stavar frá óbrúktum barnafrádrátti ella øðrum viðurskiftum. Víst verður annars til lýsingar í fjølmiðlunum frá Almannastovuni nú um dagarnar.

Hjálp til uppihald eftir § 9 í forsorgarlógini verður einans veitt sum seinasti møguleiki, tá eingir aðrir møguleikar eru at útvega tað neyðuga til lívsins uppihald. Hetta vil siga, at allar aðrar inntøkur koma fram um forsorgarveitingina, eisini útgoldin avlopsskattur.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, harmast um, at ein tílík mótrokning av avlopsskatti kemur óvart á fólk, sum fáa forsorgarveitingar. Hann hevur tí avgjørt at kanna, um broytingar skulu gerast í forsorgarlógini ella í skattalógini.

# 50.000 kr í dramatikaravirðisløn

**VIRÐISLØN**
*Tíðindaskriv*

Fyri góðari viku síðani hevði Nordisk Teaterunion fund í Stockholm. Á fundinum var avgjørt, hvør skuldi fá norðurlendsku dramatikaravirðislønina, ið er uppá kr. 50.000.-.

Hesir leikir vóru innstillaðir:

Svøríki: **Limbo** eftir Margaretu Garpe.

Noreg: **Iphigeneia & dealing with Helen** eftir Finn Iunker.

Finland: **Inga Känningar** eftir Pirkko Saisio.

Ísland: **And Björk, of course...** eftir Thorvaldi Thorsteinsson

Danmark: **Verdens ende** eftir Astrid Saalbach.

Úrslitið á fundinum var, at Astrid Saalbach gjørdist vinnari av dramatikaraprísinum í ár. Astrid Saalbach er ein av virknastu yngri dramatikarunum í Danmark. Umframt, at leikir hennara verða nógv spældir í Danmark, verða teir eisini ofta framførdir í øðrum londum. Í Føroyum kenna vit hana frá leikinum »Ósjónligi Býurin«, ið fyri nøkrum árum síðani varð framførdur í Kelduni í Skálavík, og síðani ferðaðist kring oyggjarnar.

Tíverri var eingin føroyskur leikur instillaður til dramatikaravirðislønina hesu ferð. Føroyar hava bert eina ferð verið við í kappingingini um henda prís. Tað var í 2002, tá ið Jóanes Nielsen vann við leikinum »Eitur nakað land week-end?« Og er ein avleiðing av hesum, at danska forlagið DRAMA í næstum gevur leikin út í týðingini hjá Ebbu Hentze. sigur Laura Joensen, sum er stýrislimur í Norðurlendsku Teaturuniónini.

# Verkætlan: »Okkara lív sum eldri«

**Føroya Kommunufelag hevur, saman við kommununum Luleå í Svøríki og Bodø í Norra fingið stuðul frá Útnorður Verkætlanarskránni (Northern Periphery Program - NPP) til verkætlanina - okkara lív sum eldri -. Verkætlanin gongur yvir 3 ár, frá 2004 til 2006**

**ELDRA-POLITIKKUR**
*Tíðindaskriv*

Felagið luttekur í verkætlanini til at fáa til vega tilfar og amboð fyri kommunurnar at skipa fyri eldra økinum. Sum titilin á verkætlanini sigur, er ætlanin m.a. at kanna, hvussu fólk í aldrinum 48-58 ár ynskir síni eldri ár skipað. Verkætlanin er ein av trimum sum hesa ferð fekk treytaleysa góðkenning og arbeiðið er so smátt við at byrja.

Verkætlanin er skipað í 6 partar og skal felagið standa fyri einum parti, meðan Bodø hevur 2 partar og Luleå kommuna 3 partar og er samstundis leiðari fyri verkætlanina.

Luleå Kommuna liggur í Norbotten og er 1.810 ferkilometrar. Íbúgvatalið er uml. 72.000. Bodø Kommuna er í Norður Norra og er 920 ferkilometrar. Íbúgvatalið er uml. 45.000. Báðar kommunurnar hava víkjandi fólkatal og spjaddar bygdir til felags við limakommunurnar í FKF. Í báðum kommununum eru eisini oyggjar aftrat fastlandinum.

Eftir at stuðulsumsóknin var latin NPP, hevur Aberdeen eisini víst áhuga fyri at vera við í verkætlanini.

Nærri frágreiðing um verkætlanina verður givin á umboðsráðsfundinum 28. februar 2004. Eisini verður tilfar lagt út á heimasíðu FKF.

NPP er ein grunnur sum verður fíggjaður av Evropa Samveldinum og londunum í útnorðri, eisini Føroya landsstýri.

Verkætlan um eldra økið, er skipað við FKF, Bodø Kommunu í Norra og Luleå Kommunu í Svøríki, við stuðli frá m.a. Northern Periphery Program og Evropa Samveldinum. Luttakandi og stuðlar í Føroyum eru eisini Vestmanna Kommuna, Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum, Svínoyar Kommuna, Almannaráðið, Mentamálaráðið og Oljumálaráðið.

Heimasíður:
NPP: http://www.northernperiphery.net
Luleå Kommuna: http://www.lulea.se
Bodø Kommuna: http://www.bodo.kommune.no



UTTAN ÚR HEIMI



*Mynd: Reuters*

# 12 ára gamal sjálvmorðsbumbumaður

**Tríggir palestyinskir dreingir, sum eru 12, 13 og 15 ára gamlir, vórðu tiknir, júst sum teir skuldu fremja eina sjálvmorðsatsókn í Ísrael. Palestinar eru skelkaðir av, at teir hernaðarligu bólkarnir senda børn á sjálvmorðsferð**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 12 ára gamli Jaffar Dababaat er sambært tíðindastovuni AP helst tann yngsti palestinin, sum hevur roynt at fremja eitt sjálvmorðsálop. Næstir í røðini eru tann 13 ára gamli Tarek Abu Mahsen og tann 15 ára gamli Ibrahim Suafta.

Teir tríggir dreingirnir eru ættaðir úr bygdini Tubas, og ísraelskir hermenn tóku teir, tá teir royndu at sníkja seg fram við einari vegabyrging. Sambært ísraelsmonnum høvdu dreingirnir heimagjørd vápn uppi á sær. Teir greiddu frá, at teir skuldu skjóta fólk í býnum Afula á Vestara Áarbakka. Dreingirnir eru í varðhaldi hjá ísraelsku myndugleikunum, sum ikki hava tikið støðu til, um teir skulu skuldsetast.

Áðrenn dreingirnir fóru frá húsum, høvdu teir lagt eitt bræv eftir seg. Har stóð, at teir høvdu gjørt av at fremja eitt sjálvmorðsálop fyri at mótmæla trygdarmúrinum, sum ísraelsmenn byggja á Vestara Áarbakka. Í brævinum stóð, at tann 13 ára gamli Tarek er limur í felagsskapinum Islamskt Jihad, og at hinir báðir eru limir í Al Aqsa deildunum.

– Doyggja vit sum pínslaváttar, skulu tit ikki syrgja okkum, stóð at enda í brævinum.

## Sendir avstað

Foreldrini hjá tí 13 ára gamla Tarek eru í øðini um, at teir víðgongdu bólkarnir biðja dreingir fremja sjálvmorðsálop.

– Sonur mín dugir ikki at skriva eitt tílíkt bræv, og hann hevur ongantíð verið limur í nøkrum felagsskapi. Onkur tilkomin hevur skrivað hetta brævið fyri hann, sigur Amira Abu Mahsen, sum er mamma tann 13 ára gamla Tarek. Pápin, Mohammed Abu Mahsen, sigur við AP, at kann tað prógvast, at onkur sendi dreingirnar avstað, skal viðkomandi revsast.

Leiðslan í Al Aqsa deildunum hevur avsannað, at felagsskapurin hevur nakað við málið at gera.

Palestinski ráðharrin Saeb Erekat, sum eisini er samráðingarleiðari hjá palestinsku myndugleikunum, sigur við AP, at slíkt kann als ikki góðtakast.

– Okkara børn eiga at hava eina vón og eina framtíð. Tey eiga ikki at verða sjálvmorðsbumbumenn, men læknar og verkfrøðingar, sigur Saeb Erekat.

Síðani palestinski uppreisturin byrjaði fyri 41 mánaðum síðani hava 2.688 palestinar og 930 ísraelsmenn latið lív.

# Avgerðin kann fella í dag

**Í dag er uppstillingarval í tíggju amerikonskum statum, og dagurin kann gera av, hvør stillar upp ímóti Bush, forseta**

UPPSTILLING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Eru veljarakanningarnar eftirfarandi, hevur John Kerry møguleikan at vinna í øllum teimum 10 statunum. Ger hann tað, er avgerðin fallin um, hvør skal royna seg ímóti George W. Bush, forseta í november.

Sambært kanningunum liggur Kerry klárt á odda í teimum báðum størstu statunum, Kalifornia og New York, og hann er eisini framman fyri avbjóðaran John Edwards í hinum átta statunum. Skal Edwards vinna onkunstaðni, er tað í Georgia, sum er grannastatur hjá North Carolina, haðani Edwards er ættaður, og í Minnesota verður roknað við, at munurin á teimum báðum verður ikki stórur.

Fyri at tryggja sær at verða uppstillaður skal John Kerry hava 2.161 valmenn til tann endaliga uppstillingarfundin hjá demokratiska flokkinum. Hann hevur longu tryggjað sær 524 valmenn. Vinnur hann allar tíggju statirnar í dag, fær hann 1.51 valmenn afturat.

Eygleiðarar í USA siga, at vinnur John Kerry allar ella nógv teir flestu statirnar í dag, noyðist John Edwards at gevast. Ístaðin skal hann so biðja sínar veljarar styðja John Kerry á valinum í november.

# Ringanna Harri fekk 11 av 11



*Mynd: Reuters*

**Seinasti filmurin um Ringanna Harra gjørdist sum væntað tann stóri sigursharrin á Oscar-hátíðarhaldinum**

UPPSTILLING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Undan hátíðarhaldinum var "Ringanna Harri - Kongurin kemur aftur" í uppskoti til ellivu Oscar-virðislønir, og hann fekk allar.

Eitt nú varð filmurin kostin besti filmur, og leikstjórin, Peter Jackson, varð kosin besti leikstjóri.

Tann suðurafrikanska Charlize Theron fekk heiðurin fyri tann besta kvinnuliga høvuðsleiklutin fyri leiklut sín í filminum "Monsters", og Sean Penn varð valdur sum tann besti mannligi høvuðsleikarin fyri leiklut sín í filminum "Mystic River".